# Starvsfólk
## til farmadeildina

**Søkt verður eftir starvsfólki til farmaavgreiðsluna og farmasøluna hjá Atlantic Airways á flogvøllinum.**

**Arbeiðið**
Starvsfólkið fer at virka í samstarvi við avgreiðsluna hjá Atlantic Airways á flogvøllinum í Vágum og hevur ábyrgdina av at:

· Avgreiða farm og selja farmaflutning
· Røkja farmakundar
· Avrokna farm
· Gera hagtøl og ansa eftir at sett mál verða rokkin

**Førleikakrøv**
Vit sóknast eftir fólki, ið áður hevur fingist við at avgreiða farm. Tað er ein fyrimunir, um tú eisini hevur kunnleika til at avgreiða flogfør. Somuleiðis er tað ein fyrimunir, um tú hevur skeið í at handfara vandamiklan farm.

**Annars leggja vit stóran dent á:**
· Góð samstarvsevni og ágrýtni
· Sjálvstøðugt arbeiðslag
· Hugin at arbeiða ymsar tíðir á samdøgrinum.

**Umsóknir**
Skrivlig umsókn skal vera send Atlantic Airways í seinasta lagi 15. desember 2004.

**Send umsóknina til:**
Atlantic Airways, 380 Sørvágur

Fleiri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Marius Davidsen á telefon 34 10 00 ella 21 37 03.

SANSIR 355 355

ATLANTIC AIRWAYS
Tel: 34 10 10 · Fax 34 10 01
www.atlantic.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## Starvsfólk til Heimavitjanartænastuna

Heimavitjanartænastan hjá Tórshavnar kommunu søkir starvsfólk at gera heimavitjanir hjá fólki í kommununi, sum eru eldri enn 75 ár at byrja 1. februar 2005 ella eftir avtalu.

**Útbúgving**
Viðkomandi útbúgving. Fyrimun hava fólk við útbúgving innan sosial- og heilsuviðurskifti so sum sjúkrarøktarfrøðingar, ergo- og fysioterapeutar, heilsuatstøðingar ella fólk við aðrari viðkomandi útbúgving.

**Førleikakrøv**
Ynskiligt er at umsøkjarin hevur kunnleika til:
- vanligar ellisbroytingar
- heilsuligar, almennar og sálarligar broytingar hjá eldri fólki
- at kunna meta um førleika
- kommunal, almenn og privat tilboð
- samskifti við eldri fólk
- heilsufremjan og fyribyrging
- EDV á brúkarastøði

**Persónligir eginleikar**
Viðkomandi skal vera fyrikomandi og álitisvekjandi.

**Starvs- og setanarviðurskifti**
Eftir sáttmála við avvarðandi yrkisfelag. Starvið verður skipað undir Trivnaðarfyrisitingini í Tórshavnar kommunu.

**Meiri fæst at vita**
við at venda sær til Jónvør Christiansen, leiðara fyri Heimavitjanartænastuni, á telefon 30 20 63 millum klokkan 8.00 - 9.00, ella Eyðun Jensen, sosialdeildarleiðara, á telefon 30 20 10.

**Umsókn**
saman við møguligum viðmælum og upplýsingum um útbúgving og starvsroyndir skal vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi 15. desember 2004.

**Heimavitjanar-tænastan**

Fer at halda til áTjarnargarði

Endamálið við tænastuni er m.a:
- at vitja í heiminum hjá teimum gomlu tvær ferðir um árið
- at práta um gerandisdagin
- at veita heilsuvegleiðing
- at kunna um tilboðini í kommununi

- onnur leys størv? Hygg á www.torshavn.fo



Seymistova, framleiðsla og søla av sniðgivnum (sniðgevin Borgný Dam Patursson) pløggum evnað úr reinari ull.

**Keyp serligu jólagávuna nú**
**Upplatingartilboð**
**4. desember kl. 10-17**
**30% í avsláttri av flestu vørum**

Avsláttartilboðið er bert galdandi 4. desember

Borgnýardóttir
513 Syðrugøta, tel 741100 - 441100

# NÝGGJÁRS KONSERTIN 2004
## í Ítróttarhøllini á Hálsi
## hóskvøldið 30. desember 2004 - kl. 22.00

Bólkarnir spæla í hesi røð
KRISTLEIF ZACHARIASEN
GO GO BLUES
TÝR
PÁLL FINNUR PÁLL
TERJI RASMUSSEN BAND
DJ millum bólkarnar
DJ PÆTUR SWITCH

í forsølu 140.-
v/dyrnar 170.-

**Bussar koyra**
til og frá Ítróttarhøllini á Hálsi

| | |
|---|---|
| Vestmannaleiðin | 217752 |
| Vágaleiðin | 265353 |
| Eysturoyarleiðin | 505720 |

Ring og bílegg pláss í góðari tíð

**Atgongumerkir**
eru í forsølu á hesum støðum

3'arin í SMS
Kunningarstovan í Havn
Kiosk Vár í Runavík
Myllan í Miðvági
Shellstøðin í Klaksvík
Shellstøðin í Gøtudali
Shellstøðin við Ringvegin
Shellstøðin á Frælsinum
Shellstøðin í Vestmanna
Shellstøðin á Sandi

Tryggingarfelagið Føroyar - so ert tú tryggari
Sosialurin
P/F Grannskoðaravirkið INPACT Statsaut. revisorar
HÁ-Prent
FOSS-EL Telefon 31 73 72 • Telefax 31 73 90
Shell
Restorffs
Atlantic Airways
Kyndil Tórshavn

Sosialurin Sosialurin i